# Fiskimálaráðharrin vil stuðla rækjuflotanum

**Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, heldur, at rækjuvinnan eigur at fáa stuðul. Hann heldur, at stuðul í avmarkaða tíð, kann hjálpa rækjuvinnuni úr sváru kreppuni**

RÆKJUKREPPA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Spurningurin, hvørt tað er rætt at veita kreppuraktu rækjuvinnuni stuðul er aftur aktuellur. Uppskotið hjá Sambandsflokkinum um FAS-skipan til rækjuflotan setti í seinastu viku kílar í samgonguna. Tjóðveldisflokkurin heldur seg aftur, og heldur ikki, at tað er rætt at veita rækjuvinnuni stuðul.

Fólkaflokkurin heldur tvørturímóti, at stuðul er ein møguleiki, og flokkurin umhugsar uppskotið hjá Sambandsflokkinum. Fólkafloksmaðurin og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, tekur undir sjónarmiðjunum hjá floksfeløgunum hjá sær.

– Eg haldi tað er rætt, at vit veita rækjuflotanum ein tiltrongda hjálp. Um tú kallar tað stuðul ella hjálp er fyri so vítt líkamikið, men eg taki undir við, at vit eiga at lata stuðul til rækjuvinnuna í avmarkaða tíð.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum vísir á tær stóru upphæddir, sum rækjuskipini hava vunnið til føroyska samfelgið gjøgnum árini. Hann nevnir Arctic Viking sum dømi. Síðan rækutrolarin hjá kollfirðingum kom í føroyska flotan í 1986, hevur báturin vunnið 800. mio krónur, sum á ein ella annað hátta hava verið runt í føroyska samfelagnum.

Jacob Vestergaard heldur, at tað verður eitt stórt bakkast fyri føroyska samfelagið, um hesar upphæddir svinna brádliga úr føroyska búskapinum.

## Vantandi semja

Bæði formaðurin í Fiskimannafelagnum, Óli Jacobsen og reiðarin á Hvilvtenni, Kjartan Joensen, hava lagt Jacob Vestergaard undir fyr at gera ov lítið við kreppuna í rækjuvinnuni.

Kjartan fýltist á, at ov lítil politiskur áhugi er fyri rækjuvinnuni, og Óli Jacobsen helt, at Jacob Vestergaard ikki rætt hond síðu fyri at hjálpa rækjuvinnuni

– Tað passar, at tað er alt ov lítil áhugi fyri rækjuflotanum. Felagið Rækjuskip gjørdi eina frágreiðing, har teir komu við hugskotum, hvussu karmarnir hjá vinnuni skuldu betrast. Umframt FAS skipanina, nevnir felagið millum annað stuðul til olju og flutning. Hugskotini hjá teimum fingu tá bara ongan politiskan stuðul í samgonguni. Eftir, at eg varð settur sum landsstýrismaður, vendi felagið Rækjuskip seg aftur til mín. Eg legði hugskotini aftur fyri samgonguna, men heldur ikki hesaferð, fingu uppskotini nakran stuðul. Skal eg leggja nakað uppskot fram, er neyðugt at semja er í samgonguni, og tað hevur tað ikki verið higartil, og tí er uppgávan trupul, greiðir Jacob Vestergaard frá.



*Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, heldur, at rækjuvinnan átti at fingið stuðul í eina avmarkaða tíð, so hon kann koma fyri seg aftur.*
*Mynd: Savnsmynd*

# Høgifossur er bíðistøðu

**Hóast Arctic Viking og møguliga Hvilvtenni eru á veg úr føroyska rækjuflotanum, so ætlar Høgifossur í fyrstu atløgu ikki at fylgja teimum. Reiðarin, Jákup Egholm Hansen, sigur, at teir bíða eitt sindur, og fáa síggja hvat hendir frá politiskari síðu.**

RÆKJUKREPPA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Hóast bæði Arctic Viking og møguliga Hvilvtenni eru á veg úr føroyska flotanum, so hevur Høgifossur onga ætlanir um at fylgja teimum í fyrstu atløgu. Teir siga seg vera í bíðistøðu*
*Mynd: Savnsmynd*

Tað er við at gerast ein skøva pláta at tosa um, at føroyski rækjuflotin ekur á knøðunum. Í seinastu viku fekk Arctic Viking loyvi at flagga út, og nú hoyrist graml um, at rækjutrolarin, Hvilvtenni, er seldur til Íslands.

Tað eru sjey rækjuskip eftir í flotanum, og tað kemur valla óvæntað á nakran, um fleiri rækjuskip í næstum fara úr flotanum. Reiðarin á Hvilvtenni, Kjartan Joensen segði í blaðnum í gjár, at nú er bara spurningur um tíð, áðrenn søguliga vinnan fullkomiliga steðgar upp.

## Bíða

Nú tað hoyrist, at nýggjasta rækjuskipið í flotanum, Hvilvtenni, og Arctic Viking (í eina tíð, blðm) eru á veg úr føroyska flotanum, er ein nærliggjandi spurningur um aðrir rækjutrolarar ætla at fylgja teimum

Vit hava spurt reiðaran á Høgafossi, um teir hava nakrar ætlanir um at fara úr føroyska flotanum.

– Nei vit bíða, og síggja hvat hendir. Vit vóna bara, at onkur endiliga kemur til fornuft, og sær hvussu ring støðan er. Vit seta okkara vónir til, at FAS skipanin vinnur frama, tí hon kundi verið ein fyribils loysn á kreppuni, sigur Jákup Egholm Hansen, reiðari á Høgafossi.

Hann greiðir frá, at menn, ið varða av rækjuflotanum, hava fleiri ferðir gjørt politiska myndugleikan varan við stóru kreppuna í rækjuvinnuni, men tað rínur ikki við. Kjartan Joensen helt í Sosialinum í gjár fyri, at politikkararnir tykjast ikki hava nakran áhuga í at bjarga vinnuni, og hesum er reiðarin á Høgafossi samdur í.

– Politikkararnir tykjast ikki hava serliga stóran áhuga, og tað er harmiligt. Ein stórur trupulleiki hevur verið, at vit í nógv ár hava siglt okkara egna sjógv, og hetta sæst best aftur á teimum kvotum,vit hava í dag, sum ikki eru tær bestu, sigur Jákup Egholm Hansen

## Einki studningsspøkilsi

Í farnu viku vísti Høgni Hoydal í Dimmalætting á, at Tjóðveldisflokkurin tekur ikki undir við nakrari stuðulsskipan til rækjuflotan. Flokkurin er bangin fyri at lata stuðul, tí so er skjótur vegur aftur í stuðulspolitikkin frá 80 árunnum.

Fólkaflokkurin heldur tvørturímóti, at stuðul kundi verið ein møguleiki fyri at bjarga rækjuflotanum, og fingið hann at koma fyri seg aftur.– Eg haldi, at tað í dag verður dyrkað alt ov nógv, at vit ikki mugu enda aftur í stuðulspolitikkinum í 80 árunum. Rækjuflotin er handlingslammaður í løtuni, og tí má okkurt henda. Fær flotin stuðul fyri at koma fyri seg aftur, verður talan ikki um sama studningsspøkilsi sum í 80 árunum tað. Stuðul kundi verið ein loysn fyri at rækuflotan í gongd aftur, og verður ein stuðulsskipan innførd, beri eg ongan ótta fyri, at vit aftur skulu enda í stuðulssbúskapi sum í 80 árunum, greiðir Jákup Egholm Hansen frá.



18 ÁR · 18 ÁR · 18 ÁR · 18 ÁR · 18 ÁR · 18 ÁR · 18 ÁR · 18 ÁR · 18 ÁR · 18 ÁR
FØÐINGARDAGSTILBOÐ
Hósdagin 27. nov lata vit 25% av øllum vørum
Bert galdandi hósdagin 27. november
Opið til kl. 20.00
Vit hava eisini stórt úrval av meturvørum og prýðislutum nú til jóla
Kom inn á gólvið og finn tað rætta jólastásið ella jólagávuna til hennara
SONJA DESIGN
Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979

W W W . S O S I A L U R I N . F O

# Bretsk »kanón« til Føroya

VITJAN
*Lerwick*
*Jan Müller*

Stjórin í bretska arbeiðsgevarafelagnum, Digby Jones verður gesturin á Vinnudegnum 2004. Hetta kom í lag á samkomu í Hetlandi mánakvøldið. Týsdagin hitti Eyðun Elttør sín bretska starvsbróður, Steven Timms

Hóast tað er eitt ár til »Vinnudagin 2004«, so er longu nú greitt, hvør útlendski gesturin verður. hann er ikki bert stórur í vavi, hann er eisini ein stór »kanón« í bretskum høpi. Hann fýrir ikki fyri at taka telefonina á miðjari nátt og vekja sjálvan Tony Blair. Orð, ráð og tankar hansara viga tungt, tá stórar avgerðir skulu takast í stjórnini. Maðurin sipað verður til eitur Digby Jones, og hann er stjóri í bretska arbeiðsgevarafelagnum við fleiri milliónum limum.

Digby Jones var høvuðsrøðari við eitt hátíðarhald í býráðshøllini í Lerwick mánakvøldið. Løtan var eitt av hæddarpunktunum í bretskari ella rættari hetlendskari oljusøgu. Tað eru 25 ár síðani, at fyrsta oljan úr Norðsjónum kom í land í Hetlandi.

Við til hátíðarhaldið vóru eisini fleiri føroyingar við landsstýrismanninum í oljumálum, Eyðun Elttør á odda.

Um somu tíð sum hetlendingar hyggja 25 ár aftur um bak, so hyggja teir 25 ár fram við spenningi, men eisini við iva og angist. Ber til at varðveita og menna oljuvinnuna er stóri spurningurin.

Digby Jones røsti í røðu síni hetlendingum og helt fyri, at oljuvinnan eigur mong góð ár enn.

Tað var í hesum sambandi at Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum beyð tí bretska arbeiðsgevara »bossinum« til Føroya at halda fyrilestur á tí komandi vinnudegnum. Hann tók av og gleðir seg til sína fyrstu vitjan í Føroyum.

– Eg ivist ikki í, at vit og føroyingar hava nógv at samstarva um, eitt nú á oljuøkinum sigur Digby Jones við Sosialin.

Týsdagin var stór ráðstevna í Lerwick, har m.a. bretski oljumálaráðharrin helt røðu. Høvi var so eisini hjá Eyðun Elttør at hitta og tosa við bretska starvsbróðurin, Steven Timms.

Nú fá framstig – fund – eru gjørd vestan fyri Hetland síggja oljumyndugleikar her fegnir, at olja verður funnin í føroyskum øki og at oljan kann geva arbeiði og inntøkur á oljuterminalinum Sullon Voe, tey næstu 25 árini.

Tað eru 25 ár síðani, at henda størsta oljuhavnin í Europa varð tikin í brúk.




Ynskjur tú at gerast teldunørd?

- men orkar ikki at fara undir bert ástøðiliga útbúgving?
So hevur tú møguleikan nú at fáa eina meira verkliga telduútbúgving...
Vit bjóða tær fjølbroytta útbúgving, har tú hevur møguleika at arbeiða sum t.d. mennari (udvikler), sniðgevi (designer) ella KT-ráðgevi (systemkonsulent). Útbúgvingin skiftir millum skúla og starvsvenjing.
**NetStarv** er ein 16 mánaðar long útbúgving. Hugsanin er at nýta tøknina, soleiðis at luttakararir kunnu leggja orku í at verða kappingarførir á arbeiðsmarknaðinum.

**Áhugaði kunnu venda sær á tlf. 350070 ella 211135.**
**Umsóknir skulu verða okkum í hendi, í seinasta lagi týsdagin 9. desembur 2003 kl. 16.00.**

www.alv.fo

**Málbólkur**
Serliga ætlað fólki, ið í størri ella minni mun eru førleikatarnaði, sum hava eina miðnáms og/ella víðari útbúgving ella aðrar javnbjóðis royndir. Hóast brekið hava góð útlit til at røkja eitt arbeiði fulla tíð innan eitt nú KT-vinnuna.

**Endamál**
Málrættað útbúgving til óstuðlað arbeiði á ávísari fyritøku, t.d. sum mennari, formgevi ella KT-ráðgevi.

**Starvsvenjing**
Útbúgvingin er verklig. Umleið helvtin av tíðini er starvsvenjing á eini fyritøku.

**Innihald**
Eftir gjølla ástøðiliga læring, skulu luttakararnir gera seg serkønan á ávísum økjum, t.d. dátugrunnum, sniðgeving og interaktiviteti. Útbúgvingin skiftir millum undirvísing og starvsvenjing.